# Barthez arbeiðsleysur

Fabien Barthez, sum vardi málið hjá fransmonnum í HM-finaluni, hevur onki felag hann kann spæla fyri nú HM er av.

Sáttmáli hansara Marseille gekk út í summar, og hvørki Barthez ella Marseille síggja út til at hava hug at longja sáttmálan, so landsliðsmálverjin hevur í roynd og veru onki felag at spæla fyri, og tí er hann farin at umhugsa sína fótbóltsframtíð.

- Eg vildi ynskt, at eg kundi spælt í eini tvey ár aftrat, men tað er als ikki víst at eg yvirhøvir komi at spæla aftur, sigur Fabien Barthez í samrøðu við franska blaðið L´Equipe.

Barthez hevur áður spælt við Toulouse, Monaco, Manchester United og Marseille, umframt at hann hevur spælt 87 landsdystir.

**-rwd**

# Chelsea eigur dýrasta hópin

Tað er týska Tranfermarkt sum stendur fyri metingini av leikarum og hópum hjá evropeisku stórfeløgunum, og júst sum væntað var tað Chelsea, sum endaði ovast í metingunum.

Hópurin hjá Mourinho er mettur at hava eitt virði áljóðandi 400 millinónir euro, sum svara til smáar tríggjar milliardir.

Tey bæði liðini næst á listanum aftaná Chelsea eru Barcelona og Real Madrid, har hóparnir eru mettir at hava eitt virði á ávíkavist 2,39 og 2,23 milliardir krónur.



*Jákup í Stórustovu hevur fyri tað mesta verið føroyski kontaktpersónurin hjá mongu talentskótunum*

**Ongin nýggjur Lampard**

Sum áður nevnt, hevur Frank Arnesen sæð øll liðini spælt nú kappingin er av. Stóri spurningurin er so, hvat hann og hansara skótar hava fingið burtur úr kappingini.

- Hetta hevur avgjørt verið ein spennandi kapping, men tað verður ongin sáttmáli skrivaður við nakran av leikarunum í nærmastu framtíð. Tað gera vit ongantíð aftan á eina slíka kapping. Vit vilja altíð síggja ein leikara í longri tíð, áðrenn vit taka avgerð um, hvørt hann skal hava sáttmála ella ikki.

- So í eini kapping sum hesari hyggja vit fyrst og fremst at leikarum, sum vit meta hóska til okkara støði og vit høvdu fingið gleði av, og her í Føroyum hava vit sæð eini tveir, tríggjar og kanska fýra leikarar, sum vit halda vera áhugaverdar, og kanska fara at fylgja seinni, sigur Frank Arnesen.

- Teir leikararnir eru í millum 14 og 16, tí tað eru teir, sum eru spennandi fyri okkum at fylgja. Tá ert millum 16 og 18 ert tú helst partur av besta liðnum, meðan vit eru áhugaðir í teimum, ið eru yngri enn tað. Tí er tað eisini, at vit ikki hava hugt nakað serligt at tykkara U19-landsliðið, sigur Frank Arnesen og greiðir víðari frá, hvat teir vænta av leikarunum:

- Tá vit so undirskrivað ein sáttmála við ein ungan leikara, so rokna vit ikki við, at hann kemur inn og skal yvirtaka plássið eftir Shevchenko ella Lampard. Hann skal inn at prógva sítt virði. Prógva, at hann kanska er leikarin, vit kunnu byggja framtíðina upp á, sigur Frank Arnesen avgjørdur.

**Mugu venja alt árið**

Einasti dysturin stóri maðurin úr Chelsea sá føroyingar spæla, var stórtapi ímóti Noreg. Út frá tí er helst ikki rætt at spyrja, hvat hann heldur um føroyska liðið.

- Eg vil siga sum so, at føroyska liðið fekk eitt fantastiska flott úrslit móti Íslandi, men um føroyskur fótbóltur ynskir at menna seg, so fyrsta kravið, at leikararnir venja alt árið.

- Tað sigur seg sjálvt, at Føroyar ikki eru á sama støði sum hini londini, tá steðgurin frá fótbóltinum er so langur sum hann er. Tí er tað heilt víst rætt at longja kappingina, sum tit nú hava gjørt, men tað er ikki nóg mikið, tá vit í Onglandi spæla fótbólt alt árið, sigur Frank Arnesen.

- Eitt annað hugskot fyri at ment fótbóltin her kundi verið, at allir teir bestu leikararnir venja saman einaferð um vikuna, tí tað er nakað, sum er ógvuliga gevandi, fortelur Frank Arnesen og hyggur út í gjøgnum vindeyga.

Dysturin um triðja plássið í NM-kappingini er byrjaður. Finnland og Svøríki spæla. Frank Arnesen drekkur tað síðsta kaffi, sum er eftir í koppinum, knappar jakkan aftur og fer út hyggja at, um hann kanska ber eyga við onkran evnaríkan leikara, sum kundi verið ein framtíðar styrkur hjá Chelsea.

## FAKTA

Navnið er Frank Arnesen, og maðurin er ein tann mest virdi talentskótin í øllum Evropa.

Tað er hann, sum fekk brasiliumenninar Romario og Ronaldo til Evropa, tá teir komu til PSV Eindhoven. Tað er eisini hann, ið hevur givið leikarum sum Ruud van Nistelrooy og Arjen Robben ta frægu fótbóltsuppaling, teir einaferð hava.

Í PSV Eindhoven var Frank Arnesen í nógv, men hansara eyðsýndu evni at arbeiða við evnaríkum leikarum gjørdu, at Tottenham ognaði sær hann á heysti í 2005. Har fekk hann tó ikki nógv av skafti, tí hann hevði illa nokk latið hurðanar aftur aftan fyri seg í Tottenham, áðrenn Chelsea hálaði hann út aftur og vildi hava hann til sín. Hetta kostaði Chelsea rinda 80 milliónir krónur, men aftur fyri fingu teir ein tann besta talentskótan í Evropa at hava ábyrgdina av ungdómsmenningini í felagnum.

Sum leikari var Frank Arnesen eisini góður og nógv eftirspurdur í Evropa. Barndómsfelagið æt Fremad Amager, og har frá gekk leiðin til Ajax. Arnesen spældi seks ár í Ajax, áðrenn spanska stórfelagið Vanlencia tryggjaði sær hansara undirskrift. Har var hann í tvey ár, og síðani skifti hann til belgiska Anderlecht. Úr Anderlecht gekk leiðin aftur til Holland - hesaferð til PSV Eindhoven, har hann endaði sína yrkisleið sum fótbóltsleikari.

Sum leikari gjørdi Frank Arnesen eisini vart við seg á landsliðnum, har hann fekk 52 í reyðu troyggjuni.

# TB nærri toppinum

**Eftir 2-0 á heimavølli móti VB/Sumba hevur TB vunnið seks ferðir á rað, og nú er TB bara fýra stig frá uppflytingarplássi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

TB vann mánakvøldið 2-0 á heimavølli móti VB/Sumba í 1. deild. Hetta var síðsti dysturin í 18. leikumfari.

Heimaliðið hevði yvirvág alla tíðina. Teir høvdu nógvar málmøguleikar, men tað gekk striltið at fáa úrtøku, ikki minst tí at 16 ára gamli VB/Sumba málverjin, Rani Johannesen, var sannur brandur millum stólparnar.

Fyrra málið, sum TB fekk í 9. minutti, skoraði Kaj Roest. Seinna málið fingu teir í 61. minutti. Tað skoraði Einar Petersen eftir fínt uppspæl og gjøgnumbrot í vinstru og innlegg frá Birgiri Rasmussen. Einar Petersen heilfluktaði í kassan.

Eftir at TB hevði økt um leiðsluna til 2-0, tiltuskaði VB/Sumba sær brotsspark. Kári í Lágabø royndi seg úr ellivu metrum, men stinni TB málverjin, Pedrag Markovic vardi væl fyri.

Hetta var sætta ferðin upp í slag, at TB fór av vøllinum við fullari úrtøku. TB er á fjórða plássi við 36 stigum. LÍF er nummar trý við 39 stigum, AB er næstfremst við 40 stigum, og B71 er á odda í 1. deild við 42 stigum.

Í 19. umfari, sum verður á skránni nú leygardagin, skal TB spæla á heimavølli móti LÍF. Hinir dystirnir eru B71-KÍ, HB-VB/Sumba, AB-Royn og FSVágar04-SÍ.